# Hví tortur á G! Festivalinum?

**Hví skal eitt torturkamar verða á G! Festivalinum? Margretha Nónklett frá Amnesty svarar**

TORTUR Á G!

*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

- Torturkamarið passar væl til konseptið hjá G!, sum appelerar breitt, sigur Margretha Nónklett, samskipari á føroyadeildini hjá Amnesty International.

Hon dylir ikki fyri, at Amnesty International vil fegin raka ein so breiðan málbólk sum gjørligt.

- Vit hava fyrst og fremst hugsa um, hvar nógv ung fólk koma saman. Her er G! Festivalurin eitt upplagt stað at hava eitt torturkamar. Vit trúgva, at við at venda okkum til henda málbólk upp á ein øðrvísi hátt, so kunnu vit gera tey ungu meira tilvitaði um mannarættindi, sigur Margretha Nónklett.




*Inni í torturkamarinum verða hyllar við stearinljósum, har einstaklingar kunnu birta eitt ljós fyri niðurundirkomnum torturoffrum. Tað er Ole Wich, danskur listamaður, sum hevur gjørt torturkamarið fyri Amnesty*

*Mynd: Amnesty International*

**Provokerandi**

Men kann tað ikki kennast stoytandi hjá fólki at síggja eitt torturkamar á einum tónleikafestivali?

- List má gjarna provokera, og tað verður ikki beinleiðis hugnaligt hjá fólki at koma inn í torturkamarið. Hetta er meira fyri at skapa eina tilvitsku um tortur. Fólk eiga at verða tilvitaði um ta píning, sum fer fram kring allan heim, sigur Margretha Nónklett.

Margretha Nónklett sigur, at sjálvt um vit búgva í Føroyum, so hava vit eina altjóða ábyrgd. Hon sigur, at vit mugu geva okkum far um, hvat vit kunnu gera fyri henda heim.

**Góðtaka tortur**

- Tað er eitt rák kring heimin júst nú, har tað verður alsamt meira legaliserað at brúka tortur. Tað kunnu vit ikki liva við sum einstaklingar. Vit hava ábyrgd fyri tí altjóða samfelagnum, og vit eiga at tryggja rættindini hjá øllum kring heimin, ikki bert hjá okkum sjálvum, sigur Margretha Nónklett.

Tað kann tykjast sum ein møtimikil uppgáva at beina burtur allan tortur kring heimin, men Margretha Nónklett sigur, at tað er týdningarmikið fyri Amnesty at vísa, at tað er vón fyri framman.

- Og tað er her, at torturkamarið kemur inn á tí reint súmbolska planinum. Vit varpa ljós á trupulleikan og vísa á, at tað ber til at gera nakað við støðuna, sigur Margretha Nónklett, samskipari á føroyadeildini hjá Amnesty International.

G! Festivalurin byrjar í dag, hósdagin. Torturkamarið verður í Køstinum á festivaløkinum.

**Millum tey elstu og bestu**

Føroyadeildin hjá Amnesty hevur yvir 1.000 limir. Hetta svarar til meira enn 2 % av fólkatalinum í Føroyum, og harvið er føroyadeildin hjá Amnesty millum tær lutfalsligu størstu deildirnar hjá Amnesty. Føroyadeildin hjá Amnesty er eisini millum tær elstu lokaldeildirnar hjá Amnesty. Føroyadeildin fyllir 40 ár í ár. Altjóða deildin varð sett á stovn í 1961, og longu í 1965 sá føroyadeildin hjá Amnesty dagsins ljós.

**FAKTA UM AMNESTY**

Amnesty International er ein heimsumfatandi felagsskapur, ið arbeiðir fyri at alheims viðurkendu mannarættindini verða vird og vard. Hugsjónin hjá Amnesty International er ein heimur, har hvørt einstakt menniskja fær gagn av øllum teimum rættindum, sum eru ásett í Heimsyvirlýsingini um Mannarættindi hjá ST og øðrum altjóða mannarættindareglum. Hesi rættindi eru m.a. rætturin til kropsligt og sálarligt sjálvræði, samvitsku- og talufrælsi og frælsi frá mismuni.

Kelda: Amnesty International

# Pelagisk skip partrola eftir norðhavssild

**Týsdagin lógu Christian í Grótinum og Norðborg lið um lið á Kollafirði. Teir partrola eftir sild, sum verður virkað umborð á Norðborg. Kollafjord Pelagic hevur eisini fingið eina minni nøgd av norðhavssild**



NORÐHAVSSILD

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsdagin, tá ið Sosialurin koyrdi fram við Kollafirði, var líkt til, at føroyska fiskivinnusamfelagið var endað í einum rættiligum sildaroki.

Vit høvdu frammanundan skilt, at okkara stóru pelagisku skip høvdu borið við stóra og góða norðhavssild í føroyskum sjógvi norðanfyri.

Á Kollafirði lógu tvey skip – lið um lið - úti á reduni, og vit ivaðust onga løtu í, at tey bíðaðu eftir landingartørni, samstundis sum tey á Kollafjord Pelagic stríddust við at arbeiða undan.

Men hetta var kortini ikki veruliga søgan, tá ið saman um kom.

Rætt er tó, at skipini hava fingið stóra og góða norðhavssild seinastu dagarnar, men tað er ikki Kollafjord Pelagic, sum higartil hevur fingið tað nógva burtur úr sildini.

**70 tons í land**

Jákup Oluf Hansen, virkisleiðari á virkinum í Kollafirði, sigur, at tey keyptu eini 70 tons av norðhavssild frá Christiani í Grótinum týsdagin.

Hann sigur, at sildin er bæði stór og feit, og hóast hetta er tíðin, tá ið hon kann vera fongd við nógvari æti og soleiðis blotnar skjótt, er ikki líkt til, at hetta er nakar trupulleiki sum er.

Jákup Oluf er nýggjur virkisleiðari á Kollafjord Pelagic. Hann hevur bert verið í hesum starvi einar 14 dagar.

- Tey 70 tonsini, vit keyptu frá Christiani í Grótinum, er fyrsta sildin, vit hava fryst, síðan eg kom á virkið at arbeiða.

Spurdur, hví Christian í Grótinum og Norðborg lógu úti á reduni í Kollafirði týsdagin, heldur Jákup Oluf, at Christian í Grótinum hevur pumpaði sild yvir í Norðborg, sum síðan flakasker og frystir sildina til matna.

- Sum eg havi skilt, hevur sildin higartil ikki staðið so tøtt, og tí hava skipini partrolað eftir henni.

Meðan, vit práta, sigur hann, at tað eru aðrir, sum vita nógv meira um hetta at siga enn hann.

Sum skilst, eru Finnur Fríði og Tróndur í Gøtu eisini farnir at partrola eftir norðhavssild.

Jákup Oluf vísir á, at sildin, sum Kollafjord Pelagic keypir og frystir, helst ikki skal vera meira enn einar 2-3 dagar gomul.

**Gulllaksur**

Síðan hann tók við starvinum sum virkisleiðari í Kollafirði, hevur virkið fryst nakað av gulllaksi.

- Tvey pør eru á gulllaksaveiði, vestmannaparið og leirvíksparið, harav Stjørnan og Polarhav leggja at kalla alla veiðina upp í Kollafirði.

Jákup Oluf sigur, at Kollafjord Pelagic frystir ein part av hesum fiski, men virkið keypir ikki veiðina hjá skipunum sum er.

- Tað arbeiði, sum vit gera á virkinum, er fyri reiðaríini, sum eiga skipini

Á virkinum hjá Kollafjord Pelagic kunnu tey frysta eini 300-400 tons av ráfiski um samdøgnið.

Spurdur, hvat hann annars væntar av norðhavssildini, sigur virkisleiðarin, at tað dugir hann illa at meta um beint nú.

- Eg haldi, at hetta er fyrsta nøgdin av sild, sum vit hava fingið hendan mánaðin. Skipini hava ikki fingið nakað serligt fyrr enn nú, men sum eg skilji, plagar sesongin at taka seg upp eftir ólavsøku, sigur Jákup Oluf Hansen.